# Føroysk fjarlestrarskipan

Ein lýsing



**Mentamálaráðið**

**desember 2010**

# Innihaldsyvirlit

Arbeiðsbólkur og arbeiðssetningur ... 3

Inngangur ... 3

1. Hugtakið fjarlestur ... 5
    1.1. Fjarlestur í Føroyum ... 5
2. Avtalur um lestur, fjarlestur og stuðul ...
    2.1. Hvør stuðlar ... 6
    2.2. Stuðul til lestur uttan fyri Norðurlond (ÚSUN-skipanin) ... 6
    2.3. Føroysk lesandi í Stóra Bretlandi ... 7
    2.4. Lestrarstuðul og fjarlesandi ... 7
3. Samansettar útbúgvingar við nær- og fjarlestri á Fróðskaparsetri Føroya ... 8
    3.1. Bachelor í KT skipað sum nær- og fjarlestur ... 8
    3.2. Bachelor útbúgvingin í KT sum fyrimynd ... 9
4. Fjarlestur og tú – fjarlestrardeplar ... 9
5. Stuðulsskipan til fjarlesandi ... 10
    5.1. Núverandi stuðulsskipanin hjá Studna ... 11
    5.2. Uppskot til fjarlestrarskipan ... 11
    5.3. Treytir fyri at fáa stuðul sum fjarlesandi ... 11
    5.4. Álendska/norska modellið ... 12
    5.5. Íslendska modellið ... 12
    5.6. Fíggjarligu kostnaðirnir ... 12
6. Fjarlesturin inn í útbúgvingarpolitikkin ... 12

Samandráttur og niðurstøða ... 13

## Arbeiðsbólkur

Mentamálaráðið hevur gjørt av at seta ein arbeiðsbólk at greiða frá lestrar- og stuðulsmøguleikunum hjá føroyingum og at lýsa eina møguliga føroyska fjarlestrarskipan.

Í arbeiðsbólkinum hava sitið Martin Næs (Mentamálaráðið), Jørgen Meitilberg (Mentamálaráðið), Kristianna Sjóvará (Mentamálaráðið), Terji á Lakjuni (Studni) og Dennis Holm (Granskingardepilin fyri Samfelagsmenning)

## Arbeiðssetningur

1) lýsa og greina hugtakið fjarlestur
2) greiða frá fjarlestrarskipanum í hinum Norðurlondunum
3) stutt greiða frá lestrarstuðulsskipanini í Føroyum í dag
4) lýsa ymiskar møguleikar fyri at skipa fjarlestur
    a. heiltíðarlestur/parttíðarlestur
    b. stuðulssløg: stuðul til livikostnað, skúlagjaldsstuðul, ferðastuðul v.m.
    c. stuðulsveitingar: studningur og/ella lán og/ella umlegging av láni til studning
    d. lýsa fyrimunir og vansar við ymisku fjarlestrarskipanum
5) lýsa møguleikan fyri at skapa eitt fjarlestrarumhvørvi í Føroyum
6) lýsa møguleikan at skapa samansettar útbúgvingar við nær- og fjarlestri í Føroyum.

## Inngangur

Í samgonguskjalinum stendur m.a.: "*Lestrarstuðulsskipanirnar verða endurskoðaðar.* ***Kannað verður, hvussu lestrarstuðulsskipanin kann gerast til fjarlesandi***."

Orsøkirnar til at lestrarstuðul til fjarlestur verður umhugsaður eru fleiri. Tað er ein sannroynd at yvir 60% av teimum, sum lesa hægri lestur, lesa uttanlands (sí talvu). Til samanberingar kann nevnast, at í hinum Norðurlondunum liggja tølini millum 3% og 8%, uttan í Íslandi, har talið á teimum, ið lesa hægri lestur uttanlands, er umleið 25%[1]. Viðmerkjast kann eisini, at føroyingar ofta eru yngri, tá ið tey fara heimanífrá í lestrarørindum enn lesandi í hinum Norðurlondunum. Studni staðfesti í kanning 2007, at bert umleið helmingurin av teimum, ið hava lisið uttanlands, koma heim aftur eftir lokna útbúgving. Í kanningini, ið varð gjørd saman við fleiri av lestrarstuðulsstovnunum í Norðurlondum, varð eisini staðfest, at í mun til aðrar norðurlendingar eru tað nógv færri lesandi føroyingar, sum koma aftur til heimlandið[2].

[1] Hans Wreber och Peder Bjørk (red.): "Studiestød før att studera utomlands. En nordisk modell?" En samnordisk utredning. FPA, Helsingfors 2006
[2] Miia Saarikallio-Torp and Jannecke Wiers-Jensen (eds.): "Nordic student abroad. Student mobility patterns, student support systems and labour market outcomes". Kela, Research Department, Helsinki 2010.

| **Talva 1: Føroyingar í hægri útbúgvingum - býtt á landafrøðilig øki og skúlaár** (Sí eisini fylgiskjal 1) | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|
| | **2007/08** | | **2008/09** | | **2009/10** | |
| | Lesandi | Býtið | Lesandi | Býtið | Lesandi | Býtið |
| | | | | | | |
| Føroyar | 605 | 39,1% | 701 | 39,3% | 747 | 39,9% |
| Danmark | 791 | 51,1% | 897 | 50,3% | 939 | 50,2% |
| Norðurlond | 37 | 2,4% | 34 | 1,9% | 34 | 1,8% |
| Stórabretland | 94 | 6,1% | 121 | 6,8% | 111 | 5,9% |
| Europa annars | 8 | 0,5% | 10 | 0,6% | 20 | 1,1% |
| Norðuramerika | 8 | 0,5% | 15 | 0,8% | 13 | 0,7% |
| Suðuramerika | 0 | 0,0% | 0 | 0,0% | 0 | 0,0% |
| Australia/New Z | 4 | 0,3% | 7 | 0,4% | 7 | 0,4% |
| Miðeystur | 0 | 0,0% | 0 | 0,0% | 0 | 0,0% |
| Asia | 0 | 0,0% | 0 | 0,0% | 1 | 0,1% |
| | | | | | | |
| Í alt | 1.547 | 100% | 1.785 | 100% | 1.872 | 100% |

Tølini fyri lesandi í Føroyum eru gjørd við støði í mánaðarliga lestarstuðlinum – øll í hægri útbúgvingum, ið hava fingið stuðulin í skúlaárinum, eru tald við. Tølini fyri lesandi uttanlands eru gjørd við støði í ferðastuðlinum - øll í hægri útbúgvingum, ið hava fingið stuðulin í skúlaárinum, eru tald við.
Kelda: Studni

Tvær aðrar kanningar vísa, at umleið helmingurin av teimum lesandi siga, at um tey høvdu havt møguleikan, at tikið útbúgvingina í Føroyum høvdu tey møguliga gjørt tað. Onnur kanningin er gjørd millum føroysk lesandi í Danmark í 2007 (Norðuratlantsbólkurin, 2007) og hin millum føroysk lesandi í Stóra Bretlandi í 2009 (Føroyska Sendistovan í London, 2009).

Hesar staðfestingar eru høvuðsorsøkirnar til, at umhugsað verður at kanna møguleikan at seta eina fjarlestrarstuðulsskipan á stovn undir Studna. Sannroyndin, at samfelagið verður drenað - "brain drain" - fyri dugnalig ungfólk, ið ikki koma aftur eftir lokna útbúgving er ræðandi og má takast í álvara.

Aðrar orsøkir til at taka hetta málið upp eru:

- at fleiri av teimum tilkomnu borgarunum, ið ikki hava útbúgving, fáa møguleika at økja førleikar teirra við at taka styttri ella longri útbúgvingar,
- at tað er eitt avmarkað tal av útbúgvingum, ið verða útbodnar í Føroyum,
- fjarstøða Føroya til onnur lond
- at samskiftistøknin gevur møguleika fyri hesum.

# 1. Hugtakið fjarlestur

Fjarlestur – á enskum *distance learning* og á donskum *fjernundervisning* – er heitið fyri eina frálæruskipan, har vitan verður flutt frá undirvísara til lesandi, har tann lesandi annaðhvørt ella bæði *í tíð* og *fysiskt* er staddur fjart frá undirvísaranum. Eisini er galdandi, at tøkni verður brúkt í frálæruskipanini – antin talan er um internet, video, DVD, CD, ella aðra tøkni. At enda liggur eisini í hugtakinum fjarlestur, at eitt tveyvegis samskiftið fer fram millum undirvísarar og lesandi.

Hugtakið fjarlestur er sum so ikki nýtt. Fjarlestur hevur onkursvegna verið til í út við eina øld. Í dag er fjarlestur serliga útbreitt orsakað av menningini av internetinum, men áðrenn internet-øldin byrjaði, var fjarlestur umvegis eitt nú sokallaðu "brævskeiðini" ikki óvanligt. Endamálið var tá, eins og tað er í dag, at fólk, óansæð hvar tey eru stødd, skulu kunnu menna sín førleika.

Við menningini av internetinum er tað vorðið alsamt meiri vanligt, at heilar útbúgvingar ella stórir partar av útbúgvingum kunnu takast umvegis fjarlestur. Við øðrum orðum er tað í dag púra vanligt, at lesandi í einum landi, umvegis fjarlestur, nema sær útbúgvingar í øðrum landi, uttan yvirhøvur at hava verið á staðnum, har útbúgvingin verður boðin út.

## 1.1. Fjarlestur í Føroyum

Eisini í Føroyum eru tað nógv dømi um, at einstaklingar hava nomið sær útbúgvingar umvegis fjarlestur, hetta er bæði galdandi fyri útbúgvingar á bachelor- og á masterstigi. Føroyskir lærustovnar hava eisini gjørt royndir við fjarlestri, hetta í samstarvi við útlendskar lærustovnar. Føroya Handilsskúli hevur bjóðað fram Masterútbúgving í samstarvi við Robert Gorden University í Aberdeen og á Náttúruvísindadeildini á Fróðskaparsetrinum er partur av KT-útbúgvingini gjørdur í samstarvi við Mittuniversitetet í Svøríki. Harumframt hevur Føroya Handilsskúli á Kambsdali eisini bjóðað útbúgving ella partar av útbúgving umvegis fjarlestur. Talan hevur verið um FHS- og HH-útbúgvingarnar, sum kunnu takast sum stakgreinalestur, har møguleikar eru fyri at tillaga samlaða útbúgvingarskeiðið og valið av lærugreinum hjá hvørjum einstøkum eftir tørvi.

# 2. Avtalur um lestur, fjarlestur og stuðul

Norðurlond hava sínámillum avtalu viðvíkjandi lestri á hægri lærustovnum. Henda avtala førir við sær, at fólk úr øllum Norðurlondum skulu viðgerast á jøvnum føti, líkamikið hvørjum landi tey eru úr og hvørjum landi tey ætla at lesa í. Til dømis skal ein føroyingur, ið ætlar at lesa í Svøríki viðgerast á sama hátt, sum ein svii, ið ætlar at lesa í Svøríki[3].

[3] Í 1996 gjørdu Finnland, Svøríki, Danmark, Norra og Ísland avtalu um samstarv í samband við hægri lestur, har lesandi í teimum einstøku londunum verða líkastillað, tá tey søkja inn á hægri lærustovn í Norðurlondum. Í 1999 varð henda avtala víðkað til eisini at fevna um Føroyar (http://www.norden.org/da/om-samarbejdet/aftaler/aftaler/uddannelse-og-forskning/overenskomst-mellem-danmark-finland-island-norge-

Fyri føroyingar hevur henda skipanin stóran týdning, tí hetta merkir, at føroysk lesandi, á jøvnum føti við aðrar norðurlendingar, fáa atgongd til nógvar ymiskar hægri útbúgvingar í øllum Norðurlondum.

Avtalan millum Norðurlond er skipað á tann hátt, at hon er galdandi fyri allar góðkendar lærustovnar – og fyri tær útbúgvingar, hesir lærustovnar bjóða út. Sostatt kann t.d. ikki leggjast eitt serligt gjald á lesandi úr Føroyum, sum ætla at lesa búskaparfrøði í Norra, um ikki sama gjald verður álagt norðmonnum. Hetta merkir eisini, at eru fjarlestrarútbúgvingarnar á t.d. einum svenskum hægri lærustovni ókeypis fyri sviar, so eru tær eisini ókeypis fyri føroyingar – og júst hetta er ein stórur møguleiki!

Har vit higartil hava havt góðar avtalur, sum hava gjørt tað gjørligt hjá ungum føroyingum at fara til eitt av hinum Norðurlondunum at nema sær hægri útbúgving, eru fyri føroyingar komnir nýggir møguleikar, við tað at alsamt fleiri hægri lærustovnar í Norðurlondum bjóða út fjarlestur.

Í dag hava føroyingar sostatt møguleika bæði at leita sær til eitt av hinum Norðurlondunum at nema sær hægri útbúgving, og møguleikan umvegis fjarlestur at nema sær hægri ella partar av hægri útbúgving uttan at fara av landinum. Hetta átti at verið eitt gott høvi hjá Fróðskaparsetrinum og øðrum lærustovnum at víðka um útbúgvingartilboðini, og hjá fólki í Føroyum sum heild at nema sær hægri útbúgving umvegis fjarlestur.

## 2.1. Hvør stuðlar

Viðvíkjandi spurninginum um hvaðani ein lesandi fær sín lestrarstuðul, er tað so, at tann lesandi fær stuðulin úr heimlandinum, t.v.s. at ein norðmaður, ið lesur í Danmark, fær norskan stuðul. Tó fáa vit føroyingar, sum danskir ríkisborgarar, vanliga lestrarstuðul frá SU í Danmark, tá vit lesa í einum øðrum landi enn Føroyum. Tó kann Studni veita stuðul til lestur í Norðurlondum í ávísum førum, tá SU ikki veitir stuðulin. Umframt hetta er møguligt hjá føroyingum uttanlands at fáa ferðastuðul og verkætlanarstuðul frá Studna.

Tað er tó eisini møguligt at fáa stuðul úr tí landinum, lisið verður í, um ávísar treytir eru gingnar á møti. Høvuðsreglan er, at um tann lesandi hevur búð og arbeitt í lestrarlandinum í 2 ár beint frammanundan, at viðkomandi fer undir lesnaðin, er møguleiki at fáa stuðulin úr lestrarlandinum. Tað er tó ikki møguligt at fáa stuðul frá fleiri lestrarstuðulsstovnum samstundis.

## 2.2. Stuðul til lestur uttan fyri Norðurlond (ÚSUN-skipanin)

Sum danskir ríkisborgarar hava føroyingar rætt til stuðul frá SU í Danmark, tá vit lesa uttan fyri Føroyar. Í føroysku lógini um lestrarstuðul stendur m.a.: *"Í tíðarskeiðum, tá umsøkjari hevur rætt til samsvarandi stuðul frá Statens Uddannelsesstøtte ella øðrum lestrarstuðulsskipanum, fæst ikki stuðul frá Studna."* Hetta merkir m.a., at føroyingar, ið lesa uttanlands skulu royna donsku SU-skipanina, áðrenn Studni kann veita stuðul.

---

og-sverige-om-adgang-til-videregaaende-uddannelse og https://www.retsinformation.dk/Forms/R0710.aspx?id=123006)

Tann føroyska ÚSUN-skipanin er tí ein ískoytisskipan til tey rættindi vit hava í donsku SU-skipanini. Av tí at SU ikki fyrr enn í 2008 byrjaði í ávísan mun at veita skúlagjaldsstuðul, hevur nógv tann størsti parturin av ÚSUN-stuðlinum verið skúlagjaldsstuðul, og er tað enn. Harafturat verður veittur stuðul til livikostnað í ávísan mun. Hetta verður gjørt, av tí at SU bert veitir stuðul til livikostnað í upp til 4 ár uttan fyri Norðurlond, meðan Studni veitir stuðul upp til 6 ár, tó íroknað árini, ið SU hevur veitt. Harumframt góðkennir Studni útbúgvingar, sum SU ikki góðkennir. Hetta verður gjørt í samráð við ráðgevandi nevndina hjá Studna, og um útbúgvingin verður góðkend í heimlandinum og harafturat verður góðkend av lestrarstuðulsstovnunum í Norra og/ella Svøríki.

## 2.3. Føroysk lesandi í Stóra Bretlandi

Frá 1. august 2007 eru lesandi føroyingar í Stóra Bretlandi sambært bretskari lóg at rokna sum ES-borgarar í lestrarsamanhangi[4], og gjalda tí lægra skúlagjaldið í Onglandi. Hetta merkti, at skúlagjaldið lækkaði við umleið 2/3. Í dag er skúlagjaldið fyri eina BA útbúgving í Onglandi í mesta lagi 3.170 pund ella knappar kr. 30.000 um árið. Í Skotlandi er sama lóg galdandi, men harafturat hevur skotska stjórnin samtykt, at skúlagjaldið fyri BA-útbúgvingar og ávísar MA-útbúgvingar hjá ES-borgarum, og harvið føroyingum, verður goldið av skotska lestrarstuðulsstovninum SAAS – www.saas.gov.uk .

Harafturat kann nevnast, at tað á almennum universitetum á evropeiska meginlandinum ikki er serliga kostnaðarmikið at lesa.

## 2.4. Lestrarstuðul og fjarlesandi

Tað er í dag ikki møguligt at fáa lestrarstuðul frá Studna til fjarlestur á útlendskum lærustovni, tí ein av treytunum fyri at fáa lestrarstuðul er, at tann lesandi býr í lestrarlandinum. Undantakið frá hesi meginreglu er tó, at fulltíðarlesandi á útlendskum lærustovni, ið býr í Føroyum, kann fáa ein árligan ferðastuðul.

Til samanberingar kann nevnast, at í grannalondum okkara eru reglurnar í samband við lestrarstuðul til fjarlesandi hesar:

Í **Danmark** hevur verið veittur stuðul til fulltíðar fjarlesandi uttanlands til 1. januar 2008, tá hesin møguleiki varð avtikin.

Í **Íslandi** verður stuðul veittur til "fulltíðar" lestur ella fjarlestur, bæði heima og uttanlands. Har verður stuðul veittur uttan mun til, hvar tann lesandi býr. Harafturímóti er treytin fyri at fáa stuðulin, at tann lesandi hvørja lestrarhálvu prógvar, at hann hevur staðið í minsta lagi 20 ects.

Í **Norra** verður ikki veittur stuðul til fjarlestur uttanlands, men stuðul verður veittur til fjarlestur við norskar útbúgvingarstovnar.

---

[4] Statutory instruments, 2007 No. 779, Education, England: The Education (Fees and Awards) (England) Regulations 2007

Í **Svøríki** hevur bert verið veittur stuðul til fjarlestur uttanlands í serstøkum førum, t.d. um tann lesandi orsakað av sjúku ella breki ikki kann lesa í lestrarlandinum, men frá 2009 er møguligt at fáa stuðul til fjarlestur innan ES.

Í **Álandi** verður stuðul veittur til fjarlestur á sama hátt sum til lestur heima. Fjarlestur er ikki nevndur í lóggávuni, men tað stendur onki í lógini um, at tann lesandi skal vera búsitandi í lestrarlandinum, t. d. lesa fleiri álendingar búsitandi í Álandi við Universitetið í Umeå í Svøríki.

# 3. Samansettar útbúgvingar við nær- og fjarlestri á Fróðskaparsetri Føroya

Føroyar eru eitt lítið land við avmarkaðum fólkatali og hetta hevur eisini stóra ávirkan á, hvørjar útbúgvingar ein hægri lærustovnur í Føroyum kann bjóða. Higartil hava útbúgvingar á Setrinum í stóran mun verið samansettar útfrá førleikunum hjá starvsfólki (lærarum) á Setrinum og í Føroyum annars. Víst verður eisini til “1.1 Fjarlestur í Føroyum”

Men við vaksandi útbúgvingartilboðum umvegis fjarlestur eru eisini skaptir nýggir møguleikar fyri Setrið. Har útbúgvingartilboðini fyrr vóru neyvt tengd at lærararførleikanum, ber í dag til at samanseta útbúgvingar soleiðis, at talan gerst um eina samansetta útbúgving við nær- og fjarlestri.

## 3.1. Bachelor í KT, skipað sum nær- og fjarlestur

Á Náttúruvísindadeildini á Setrinum eru longu royndir gjørdar við slíkari skipan, hetta í samstarvi við Mittuniversitetet í Svøríki. Bachelor útbúgvingin í KT, ið varð boðin út á heysti 2010, er skipað sum ein samansett útbúgving, har ein partur er nærútbúgving, har undirvísing verður veitt á Náttúruvísindadeildini, meðan ein annar partur er fjarlestur, sum verður veittur av Mittuniversitetet.

Náttúruvísindadeildin og Mittuniversitetet hava gjørt avtalu um samstarv um bachelor útbúgvingina, sum byrjaði í heyst. Tey lesandi verða alt tíðarskeiðið í Føroyum. Í hesum førinum er talan um, at 20-30 prosent av útbúgvingini verður tikin sum fjarlestur, veitt av Mittuniversitetet, og verður hesin parturin lagdur í seinnu hálvu av bachelor-útbúgvingini.

Samstarvið millum Setrið og Mittuniversitetet hevur ikki nakra beinleiðis útreiðslu við sær. Fjarlestrartilboðini frá Mittuniversitetet eru ókeypis. Og samsvarandi avtaluni um útbúgvingar í Norðurlondum kostar tað ikki lesandi á Setrinum nakað at fylgja hesum útbúgvingum. Leggjast kann afturat, at fjarlestrartilboðini frá Mittuniversitetet eisini eru ókeypis fyri ES-borgarar.

Við øðrum orðum hevur tað á Setrinum við hesum samstarvi borið til at bjóða út eina spennandi bachelor útbúgving í KT, har partur av útbúgvingini verður tikin umvegis fjarlestur, uttan at hetta fyri Setrið ella tey lesandi hevur nakran kostnað við sær. Harumframt kann staðfestast, at núverandi lestrarstuðulslóggáva eisini heimilar stuðul til henda partin av lesnaðinum, í og við, at fjarlesturin er ein partur av lestrinum á Fróðskaparsetrinum.

Við tað at partar av útbúgvingini verða tiknir umvegis fjarlestur, merkir hetta eisini, at Náttúruvísindadeildin ikki skal seta av lærarar til at undirvísa í hesum tíðarskeiðinum. Í hesum tíðarskeiðinum fáa starvsfólkini, sum annars skuldu undirvíst, møguleika at granska og á tann hátt menna egnan førleika og førleikan á Náttúruvísindadeildini og Setrinum sum heild. Í hesum tíðarskeiði fáa starvsfólk eisini møguleika at arbeiða við at menna nýggj útbúgvingartilboð – útbúgvingar, sum eisini kundu verið skipaðar sum nær- og fjarlestur.

Fyri tey lesandi er hetta eisini eitt spennandi tilboð, tí tey fáa tilboð um útbúgving, har undirvíst verður bæði á Setrinum og á Mittuniversitetet, t.v.s. at tey koma at kenna bæði tað føroyska lestrarumhvørvið og lestrarumhvørvið á Mittuniversitetet, á einum stórum norðurlendskum hægri lærustovnu. Harumframt hevur tað eisini týdning fyri prógvið hjá teimum lesandi, at vísast kann á, at tey hava tikið lærugreinar á tveimum ymiskum universitetum.

### 3.2. Bachelor útbúgvingin í KT sum fyrimynd

Skipanin av bachelor útbúgvingini í KT á Náttúruvísindadeildini kann gerast ein fyrimynd fyri onnur øki innan útbúgvingar í Føroyum. Fyri Setrið er hetta ein framúr góður møguleiki at víðka um útbúgvingartilboðini, uttan at tað neyðturviliga skal føra við sær stórar hækkingar í útreiðslunum og harvið hækkingar í játtanini á fíggjarlógini.

Setrið eigur beinanvegin at fara undir at kanna møguleikarnir fyri at samanseta útbúgvingar við nær- og fjarlestri á øðrum økjum, og brúka tær royndir, sum Náttúruvísindadeildin longu hevur við KT-útbúgvingini.

Eftirmetingar eiga leypandi at verða gjørdar av útbúgvingum, sum eru samansettar við nær- og fjarlestri.

## 4. Fjarlestur og tú - fjarlestrardeplar

Gongdin í samfelagnum tey seinastu ártíggjuni hevur m.a. verið merkt av, at alsamt fleiri fáa sær miðnámsútbúgving og eftir tað eina førleikagevandi útbúgving. Tær førleikagevandi útbúgvingarnar verða ofta tiknar á hægri útbúgvingarstovnum antin í Havn ella uttanlands. Henda gongdin hevur ført við sær, at fólk flyta bæði úr útjaðaranum og úr Føroyum sum heild í styttri og longri tíðarskeiði. Úrslitið er, at fólkatalið í útjaðaranum í Føroyum er minkað, umframt at gongdin í fólkatalinum í Føroyum sum heild hevur verið skeiva vegin, m.a. við einum stórum undirskoti av kvinnum.

Atgongd til førleikagevandi útbúgving í heimstaðnum hevði uttan iva broytt nakað um hesa gongd. Valið at fara undir útbúgving hevði tá ikki samstundis verið eitt val, sum kravdi, at man flytir úr heimstaðnum ella av landinum – og hevði sostatt heldur ikki verið eitt val, har útbúgving hevði verið sett upp ímóti at kvetta við tað sosiala umhvørvið, ein livur í.

Júst í hesum sambandi er fjarlestur ein góður møguleiki. Handilsskúlin á Kambsdali hevur í nøkur ár bjóðað út FHS og HH sum fjarlestur við tí endamáli at royna nýggjar

undirvísingarhættir og samstundis at vera við í fremstu røð, tá um útbúgvingartilboð ræður. Arbeiðsbólkurin hevur staðfest, at talið av útbúgvingum yvirhøvur, sum kunnu takast umvegis fjarlestur er alsamt vaksandi og valmøguleikarnir hjá tí einstaka gerast tí eisini fleiri sum frálíður.

Í grannalondum okkara, eitt nú í Skotlandi, er fjarlestur ein partur av økismenningarpolitikkinum, skilt soleiðis, at skipanin við fjarlestri ger tað gjørligt hjá fólki í útjaðaranum í skotska hálendinum og skotsku oyggjunum at nema sær útbúgving uttan at skula flyta úr økinum, har tey búgva. Royndirnar í Skotlandi vísa, at har fólk hava sitið einsamøll, hevur fráfallið verið størst, men tá møguleiki er at vera saman við øðrum fjarlesandi, t.d. á deplum fyri fjarlestur – eisini um talan ikki er um sama fak – hevur fráfallið verið væl minni.

Royndir úr Skotlandi vísa sostatt, at ein av avbjóðingunum er at fáa skapt eitt fjarlestrarumhvørvið, har tey, ið nema sær útbúgving umvegis fjarlestur, kunnu koma saman. Ein møgulig loysn uppá hetta er at skapa deplar fyri fjarlestur kring landið.

Í Íslandi eru eisini royndir við fjarlestri og fjarlestrardeplum, eitt nú bjóðar Universitetið á Akureyri út fjarlestur og er hesin skipaður soleiðis, at lesandi kunnu fylgja lestrinum á fjarlestrardeplum, sum eru kring landið. Talan er um eitt fjølbroytt útboð av útbúgvingum m.a. sjúkrarøktarfrøðingar, lærarar, búskaparfrøðingar og náttúrufrøðiligar útbúgvingar, m.a. eina serliga fiskivinnuútbúgving (seafood management).

Í Føroyum kundu hesir fjarlestrardeplar t.d. verið knýttir at verandi miðnámsskúladeplum ella øðrum fakligum umhvørvi, har møguleiki eisini er at fáa leiðbeining í samband við útbúgvingina. Mælt verður til, at ein royndarskipan verður gjørd í t.d. tveimum økjum, har skipanin kann skipast í samstarvi við Mentamálaráðið og avvarðandi kommunu(r). Men fyri yvirhøvur at fáa føroyingar, ung sum tilkomin, at fara undir fjarlestur, er eisini neyðugt við skipaðari kunning um, hvørji fjarlestrartilboð eru í grannalondum okkara, og undir hvørjum treytum hesar útbúgvingar kunnu takast. Tí verður eisini mælt til, at kunning um fjarlestur í grannalondum okkara verður skipað á einum portali.

Harnæst er eisini neyðugt, at fjarlesandi fáa lestrarstuðul á jøvnum føti við onnur føroysk lesandi.

# 5. Stuðulsskipan til fjarlesandi

Sum nevnt, so kann skiljast ímillum fjarlestur, sum partur av útbúgvingunum á Setrinum ella øðrum útbúgvingarstovni, og fjarlestur sum eitt tilboð til tann einstaka. Sum er, er allur lestur á Setrinum – eisini um talan er um, at útbúgvingin fevnir um fjarlestur í samstarvi við t.d. universitet uttanlands – fevndur av verandi lestrarstuðulslóg, og fáa lesandi sostatt lestrarstuðul. Lógin um lestrarstuðul heimilar, sum er, tó ikki lestrarstuðul til einstaklingar, sum lesa fjarlestur, tí er neyðugt við broytingum í verandi lestrarstuðulslóg ella at gera sjálvstøðuga lóg til eina nýggja stuðulsskipan til fjarlesandi.

## 5.1 Núverandi stuðulsskipanin hjá Studna

Meginreglurnar fyri at fáa stuðul frá Studna eru, at talan skal verða um heiltíðarlestur og tann lesandi skal búgva í lestrarlandinum. Stuðulstíðarskeiðið  er vanliga í mesta lagi 6 ár til hægri útbúgvingar.  Stuðul, ið tann lesandi hevur fingið frá øðrum lestrarstuðulsskipanum, oftast frá SU í Danmark, verður taldur við í tey 6 stuðulsárini.

**Hættirnir** at stuðla eru nógvir. Í verandi lestrarstuðulsskipan veitir Studni fylgjandi stuðlar:

- studning til livikostnað, sum er tann mánaðarligi studningurin (her verður skilt millum tann hægra studningin og tann lægra studningin)
- lán ella endalán til livikostnað
- studning til skúlagjald uttanlands
- lán til skúlagjald uttanlands
- ferðastudning innanoyggja
- ferðastudning millum lond
- bókastudning
- vistarhaldsstudning
- barnsburðarfarloyvisstudning
- barnastudning
- studning til einsamallar uppihaldarar
- verkætlanarstudning

## 5.2 Uppskot til fjarlestrarskipan

Ein stuðulsskipan til einstaklingar, sum eru fjarlesandi, kann skipast á fleiri ymiskar hættir. Avbjóðingin er at skapa eina skipan, sum eggjar fólki kring landið at gera nýtslu av fjarlestrar-tilboðum, men forðar fyri misnýtslu.

Sum tað framgongur omanfyri er tann vanliga lestrarstuðulsskipanin ógvuliga samansett. Tað er týdningarmikið, at ein stuðulsskipan til fjarlestur ikki er fløkt, men einføld fyri tann lesandi og løtt at umsita hjá Studna.

Skotið verður upp at gera eina skipan, ið bert veitir studning til livikostnað og møguliga lán til livikostnað, ella eina skipan, ið bert veitir lán til livikostnað, sum síðani partvíst ella heilt verða umløgd til studning, so hvørt próvtøkurnar verða tiknar. Tað er so upp til tann fjarlesandi at gera av, um studningurin/lánið verður nýtt til livikostnað, til skúlagjald, ferðaútreiðslur ella aðrar útreiðslur í sambandi við lesnaðin.

## 5.3 Treytir fyri at fáa stuðul sum fjarlesandi

Ein av treytunum má verða, at tann lesandi hevur stuðulstíð eftir av kvotuni uppá 6 ár til hægri lestur. Harafturímóti skal tað ikki verða neyðugt at vera fulltíðarlesandi fyri at fáa stuðul. Víst verður í hesum sambandi á, at bæði í tí svensku og álendsku lestrarstuðulsskipanunum verður stuðul veittur í mun til, hvussu nógv verður lisið. Í álendsku skipanini er tað soleiðis, at fyri at fáa fullan lestrarstuðul, er kravið, at tey lesandi skulu vera

meiri enn 80% lesandi. Eru tey lesandi 50-80% av fullari lestrartíð, fáa tey hálvan lestrarstuðul.

Ein onnur fortreyt fyri at fáa stuðul kann vera, at persónliga inntøkan ikki má verða hægri enn ávísa upphædd. Víst verður til viðmerkingar til uppskot um broyting í løgtingslóg um lestrarstuðul, ið er lagt fyri Løgtingið á heysti í 2010.

Niðanfyri eru tvey uppskot til eina komandi lestrarstuðulsskipan til fjarlestur.

### 5.4 Álendska/norska modellið

Stuðulin til livikostnað verður veittur sum lán og síðani lagdur um til studning, um og tá tann lesandi stendur próvtøkurnar. Verður lisið tað, ið svarar til 80-100% fæst maksimala upphæddin – í dag kr. 3.737 um mðr. Verður lisið millum 50% og 80% verður helvtin av stuðlinum latin. Verður lisið minni enn tað, ið svarar til hálva tíð, verður stuðul ikki latin.

### 5.5 Íslendska modellið

Stuðulin til livikostnað verður ikki latin, fyrr enn eftir at tann lesandi hevur staðið próvtøkurnar. Fyri at fáa stuðulin fyrstu ferð, skal tann lesandi hava staðið ávísan part av útbúgvingini, t.d. tað, ið svarar til 30 ECTS (hálvt ára fulltíðarlestur). Tá hetta er skjalfest verður útgoldið stuðul fyri 6 mánaðir. So hvørt sum próvtøkurnar verða tiknar verður útgoldið í mun til tal av ECTS – 5 ECTS = ein mánaðarligan stuðul (í dag kr. 3.737). Neyðugt verður helst við eini áseting um ávísan lestrarfrekvens, t.d. at lisið verður í minsta lagi hálva tíð.

### 5.6 Fíggjarligu kostnaðirnir

Trupult er at siga nakað heilt ítøkiliga um, hvørjir fíggjarligu kostnaðirnir av nevndu fjarlestrarskipanunum verða. Ein partur av teimum, sum í dag eru fjarlesandi, hava umframt lesturin eisini arbeiðið, og hevði hetta avmarkað støddina á lestrarstuðli til hesi. Spurningurin er tó, um hesi høvdu frávalt at arbeitt, um tey fingu lestrarstuðul.

Hugsandi er tó, at tá slíkar stuðulsskipanir verða stovnaðar, fara fólk at gera nýtslu av teimum. Jú betri skipanin er, jú fleiri fara helst at brúka hana.

## 6. Fjarlesturin inn í útbúgvingarpolitikkin

Málið er at fáa fjarlesturin inn í útbúgvingarpolitikkin. Eitt hugskot er at skipa eitt forum har stovnar, fyritøkur og einstaklingar, ið á ein ella annan hátt fáast við fjarlestur hittast og hava møguleika at skifta orð um fjarlestur. Líknandi forum eru í øðrum Norðurlondum og skipa hesi forum fyri ymiskum tiltøkum, sum á ein ella annan hátt hava til endamáls at menna fjarlestur sum útbúgvingartilboð. Samstarv kundi verið tikið upp við hesi forum, t.d. Fluid í Danmark og NFF í Norra. Handilsskúlin á Kambsdali luttekur sum er í Fluid felagsskapinum og hevur haðani heintað nógv sambond, sum góð eru at brúka.

Eitt annað hugskot er, at Føroyar gerast virkin í ymiskum altjóða netverkum, sum fáast við fjarlestur. Fjarlestur fer í stóran mun fram um landamørk, og tí eru altjóða netverk av alstórum týdningi. Í tílíkum netverkum eru Føroyar eisini áhugaverdar sum land, tí vit hava avbjóðingarnar bæði á tjóðskaparligum og á altjóða støði. Okkara royndir kunnu koma til gagns seinni. Føroyar luttaka sum er í Distans, sum er netverksbólkur undir Nordisk Netværk for Voksnes Læring (NVL), sum er fíggjaður av Norðurlendska ráðharraráðnum. Í hesum bólki og teimum aktivitetum, sum bólkurin fyriskipar eru nógv sambond og nógv vitan at heinta um fjarlestur.

At enda kundi verið vert at gjørt eina kanning, har fyrimunir og vansar vórðu lýstir og har stundir vóru til at kanna og gjørt verulig uppskot um, hvussu fjarlestur kann skipast í verki, við t.d. fjarlestrardeplum, lestrarvegleiðing, fjarlestrarportali o.s.fr.. Ein tílík kanning kundi eisini verið skipað sum ein royndarverkætlan á einum av verandi skúlum. Hugsast kundi, at norðurlendsk sambond og t.d. NORA, ALS og kanska Nordplus høvdu áhuga í eini tílíkari verkætlan.

# Samandráttur og niðurstøða

Við eini føroyskari fjarlestrarskipan kunnu vit styrkja um útbúgvingartilboðini á Fróðskaparsetri Føroya og øðrum útbúgvingarstovnum og gera hesi meira fjøltáttað. Við eini góðari fjarlestrarskipan ber tað eisini til hjá tí einstaka at førleikamenna seg í nógv størri mun, enn tá ið hugsað verður um ta vanabundu og siðvandu útbúgvingarskipanina, sum í dag valdar í okkara útbúgvingarskipan.

Av møguleikum, sum liggja í eini fjarlestrarskipan, kundu t.d. verið nevndir:

- at Fróðskaparsetur Føroya og aðrir útbúgvingarstovnar kunnu víðka um síni útbúgvingartilboð
- at føroyingar, sum ynskja tað, kunnu nema sær hægri útbúgving umvegis fjarlestur
- førleikamenning av útjaðaranum í Føroyum
- førleikamenning av Føroyum sum útjaðara í Evropa
- tøknilig menning av undirvísingaramboðum og háttaløgum
- mennir møguleikar fyri lívslangari læring
- altjóðagerð
- effektivisering av útbúgvingarsektorinum, tvs. meira frálæra fyri hvørja krónu

Tað er av alstórum týdningi, at føroyska útbúgvingarpolitiska lestrar- og stuðulsskipanin eisini leggur upp fyri, at pláss verður fyri eini fjarlestrarskipan, sum vit sjálv leggja til rættis og hava ábyrgdina av. Verður einki gjørt, er vandi fyri, at fjarlestur uttanífrá so líðandi máar støðið undan pørtum av verandi almennu útbúgvingartilboðunum í Føroyum.

Umráðandi er, at ein fjarlestrarskipan beinanvegin verður hugsað inn í føroysku útbúgvingarskipanina - á øllum stigum. Her verður m.a. hugsað um stuðulsmøguleikar, fjarlestradeplar og samansettar útbúgvingar við nær- og fjarlestri.

*FJARLESTUR KANN:*

- *GEVA TEIMUM MØGULEIKA AT LESA, SUM IKKI KUNNU LESA Í TEIMUM VANLIGU SKÚLASKIPANUNUM*
- *FARA FRAM UMVEGIS TELDUSAMSKIFTI, OG NÝGGJASTA TØKNIN VERÐUR BRÚKT Í HESUM SAMBANDI*
- *VENDA SÆR TIL LESANDI Í FØROYUM OG UTTANLANDS*
- *GERA TAÐ MØGULIGT AT LESA, UTTAN MUN TIL HVAR TANN LESANDI ER STADDUR, BARA TØKNIN ER Á ÁVÍSUM STØÐI*